ÍF-B68 1-1 (1-1):

# Toftamenn komu á talvuna

**Avrikini í Fuglafirði kundu bent á, at tað verður millum hesi bæði, at stríðið fyri at sleppa undan beinleiðis niðurflytingini fer at standa**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*



*Sum tað framgongur aðrastaðni á síðuni, so helt Magni á Lakjuni eftir dystin, at teir í ÍF høvdu sparkað ov nógv, heldur enn at spæla bóltin*

Tað skal nógv venda upp seinni í summar, sum nú vendir niður, um tað ikki fara at verða ÍF og B68, sum um mánaðarskiftið september/oktober fara at stríðast fyri at sleppa undan tíggjunda og aftasta plássinum og harvið beinleiðis niðurflyting.

Støðutalvan lýsir støðuna í tølum, og á vøllinum í Fuglafirði sunnudagin var tað ikki nógv, sum bendi á, at innheystingin fer at verða so nógv størri næstu vikurnar, enn hon hevur verið higartil. Skal úrtøkan gerast størri, so skal spælstøðið hækkast. Hetta er galdandi fyri tekniska førleikan, spælfatanina og ikki minst skjótleikan og harvið evnini at venda spælinum og hjá miðvallarunum at stuðla uppundir álopsspælararnar.

Báðir partar løgdu tað fyri, sum teir megnaðu. Á báðum liðunum var ein nýggjur maður. Jan Guttesen var á ÍF miðvøllinum fyri fyrstu ferð nakrantíð. Honum tykist tað at fera at verða góður fongur í.

Í vinstra verjuborði hjá B68 var John Heri Dam. Hann var neyðloysn fyri týdningarmikla Jákup Eli Olsen, ið var so mikið skaddur, at hann ikki var førur fyri at spæla. Bogi Petersen, sum hevur roynst væl hjá B68 higartil í ár, varð so mikið skaddur undir venjing hóskvøldið, at hann var ikki førur fyri at spæla, og tað mátti sigast at vera steinur oman á byrðu, tá ið heldur ikki Stanislav Stankov var førur fyri at spæla orsaka av skaða. John Heri Dam tóktist vera hampuliga væl fyri og stóð seg væl.

### Tøtt mál

ÍF legði seg á odda, tá ið knappliga tíggju minuttir vóru farnir. B68 miðverjan ryggskumpaði og fekk fríspark ímóti sær úr góðari støðu uttanvert brotsteigarmarkið. Miðvallarin Høgni Zachariassen smekkaði til. Skotroyndin var neyv, og bólturin streyk framvið ikki heilt væl setta manngarðin og dygst inn við stólpanum.

B68 svaraði aftur, tá ið fyrra umfarið var knappliga hálvrunnið. Alex Troleis legði fríspark innfyri úr høgru. Mortan Hansen var púra leysur. Í fyrstu atløgu fekk hann ikki skot á, men fuglfirðingar góvu honum frið at temja, og í næstu atløgu eydnaðist tað honum at skovla bóltin inn um strikuna. Mortan Hansen hevur verið málverji á Toftum, síðani Albert Sævarsson fór av landinum. Síðani Trygvi Mortensen kom til Toftir, hevur Mortan roynt seg sum álopsspælari, og enn eina ferð vísti hann, at tað eru mál í honum.

Nýggjur í B68 málinum er Jacek Przybylski, sum fyrrapartin av síðsta kappingarári vardi málið í Gøtu. Hann hevði tvær góðar bjargingar, tá ið teir á heimaliðnum royndu seg við langskoti hjá Jan Guttesen royndi seg úti frá, og tá ið Høgni Zachariassen seint í 2. hálvleiki royndi seg við góðum stútara.

Nógv gekk fyri seg millum brotsteigarnar. Í fyrra umfarinum leikaði javnt á. B68 hevði fleiri hornaspørk enn heimaliðið, og eftir steðgin tóktist tað sum um, at heimaliðið hevði eitt sindur størri íblástur. Men teir fingu einki mál, og ímóti endanum var tað um reppið, at B68 fekk sigursmálið. Eftir skotroynd misti Karstin Joensen, bólturin støkk út frá aftur, har Øssur Hansen, sum alla tíðina reikaði nógv aftanfyri fremsta B68 álopsspælaran, var fyrstur á, men skotroyndin hjá B68 liðformanninum brast í stólpan, og so endaði tað 1-1.

Hjá ÍF var tað serligur smeitur, at Bartal Eliasen ikki var í álopinum hesa ferð. Magni á Lakjuni var einsamallur mitt fyri, og eitt sindur aftanfyri í borðunum vóru Hanus Eliasen og Bárður á Lakjuni. Tað gekk ikki nóg væl at spæla seg fram til fremstu menninar, og tá er tað torført hjá álopsspælarum, sum hava betri evni at spæla fótbólt, enn teir hava at stríðast eftir longum og ofta óhøgligum sendingum.

Næstu ferð skal ÍF í Gundadal, har gamla felagið hjá Sigfríði Clementsen, B36, bíðar. Eftir at teir í B36 hava spælt fýra ferðir uttan at hava fingið fult kunnu fuglfirðingar, sum higartil einki hava fingið á útivølli, ikki rokna við øðrum, enn at uppgávan verður torfør. Tað verður hon eisini hjá B68, sum skal til Eiðis.

## FAKTA UM DYSTIN

**ÍF-B68 1-1 (1-1)**
1-0: Høgni Zachariassen 8.
1-1: Mortan Hansen 24.
**Dómari:** Dagfinn Olsen
**ÍF:** Karstin Joensen – Árni Petersen, Viggo Johannesen, Áki Petersen, Fritleif í Lambanum - Jan Guttesen, Eyðolvur Petersen, Høgni Zachariassen – Hanus Eliasen (Atli Petersen, 46.), Magni á Lakjuni (Ken Bærentsen, 74.), Bárður á Lakjuni (Poul Iburg, 63.)
**Gult kort:** Høgni Zachariassen
**B68:** Jacek Przybylski – Alex Troleis, Oleif Joensen, Kári Sigvardsen, John Heri Dam – Óli Olsen (Jóhan Petur Poulsen, 54.), Eyðstein Skipanes, Mikkjal Thomassen, Øssur Jacobsen (Kristian Anton Andreasen, 73.) – Øssur Hansen - Mortan Hansen (Jóhan Dávur Højgaard, 70.)
**Gult kort:** Mikkjal Thomassen

# Spæla ov lítið

Veteranurin í ÍF álopinum heldur, at hansara menn mugu finna spælið framaftur og ikki sparka, sum teir hava gjørt síðstu vikurnar

Tá ið fyrsta umfarið í landskappingini var av, segði ÍF venjarin, Sigfríður Clementsen, á hesum síðunum, at teir í Fuglafirði høvdu gjørt upp við seg sjálvar, at tað skuldi verða fótbóltsspælið, sum skuldi halda teimum í fremstu deildini.

Avrikini seinastu vikurnar kundu bent á, at tað stendur ikki so væl til við fótbóltsspælinum, og hesum er álopsveteranurin, Magni á Lakjuni, samdur í:

– Vit mugu aftur til fótbóltsspælið. Vit hava nógvar góðar fótbóltsspælarar. Tí er tað púra við síðuna av, at tað verður so nógv sparkað, heldur enn at tað verður spælt.

*Nú skulu tit spæla í Gundadali ímóti B36?*

– Um vit fara at spæla fótbólt móti teimum, so síggi eg ikki so dapurt upp á uppgávuna. Um vit fara at sparka, sum vit hava gjørt tær seinastu ferðirnar, so verður tað meiri enn torført, sigur Magni á Lakjuni.

**jh**

# Trygvi trýr uppá tað

B68 venjarin heldur ikki, at tað er nøkur orsøk at geva skarvin yvir, hóast tað framvegis er langt fram til bjargingina

Nýggi B68 venjarin, Trygvi Mortensen, heldur ikki, at hansara menn nýtast at geva skarvin yvir, hóast teir bara hava fingið eitt stig og tað er langt fram til áttanda plássið og harvið trygdina fyri endurvinning av plássinum í bestu deildini.

– Hugburðurin var góður í Fuglafirði. Í 1. hálvleiki haldi eg, at vit vóru leikliga omaná. Vit komu fleiri ferðir til baklinjuna og høvdu fleiri hornaspørk. Sammett við ímóti VB hekk tað betri saman.

*Men tað er langur vegur burtur av aftasta plássinum?*

– Talvan sigur, hvussu støðan er. Í fyrstu atløgu mugu vit hava eyguni eftir 9. plássinum. Men tað snýr seg bara um næstu uppgávuna. Hon verður stór á Mølini á Eiði, men eg haldi, at tað eigur at bera til at fáa nakað burturúr. Vit skulu minnast til, at fýra av spælarunum, sum ivaleyst høvdu verið boð upp á at vera millum teir fyrstu ellivu hesa ferð, vóru ikki tøkir. Tað svíður, tá ið úrvalið ikki er serliga stórt frammanundan, staðfestir B68 venjarin.

**jh**



NSÍ-EB/Streymur 1-0 (1-0):

# NSÍ heldur seg á kambinum

**Hóast teir síðstu løtuna royndu at leggja trýst á, so vóru gestirnir á stevnuni í Runavík ongantíð rættulig hóttan móti heimaliðnum**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*



*Runavíkingar hava leikt fimm dystir á rað uttan at tapa, og nú er liðið av álvara farið at nærkast oddinum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Í kappróðrinum gekk ikki væl hjá vertunum á Skálafjørðinum. Hvørki so ella so. Men í fótbóltinum bjargaði NSÍ stevnuhýrinum hjá teimum, sum hildu við heimaliðnum. Áskoðarafjøldin var ikki serliga stór, tá ið havt verður í huga, at talan var um stevnudyst, og tá ið viðhaldsfólkini hjá EB/Streymi vóru lutfalsliga mong.

Fyri fimtu ferð á rað fór NSÍ av vøllinum uttan at hava tapt. Teir vunnu 1-0, og sigursmálið fingu teir miðskeiðis í 1. hálvleiki. Miðvallarin Ian Højgaard átti síðsta fótin á. Eftir uppspæl í høgru legði Helgi L. Petersen innfyri, og við handara stólpan fekk Ian høvi at geva sær tíð við temjingini, áðrenn hann sendi bóltin í málið aftanfyri Gunnar á Steig.

Fótbóltsspælið var ikki nakað at reypa av. Alt fyrra umfarið og eina løtu av seinna hálvleiki var NSÍ meiri ágangandi. Teir vunnu nógvar nærdystir, og teir tóktust leingi vera eitt sindur skjótari enn mótstøðumenninir.

Teir ungir spælarar vóru í sentralum leiklutum hjá NSÍ. Jústinus R. Hansen hevur – fyribils í hvussu so er – vunnið kappingina um miðvallarpláss við Kára Hansen, og Andy Olsen var aftur hesa ferð á toppinum í eitt sindur fleksiblu 4-3-3 uppstillingini.

Oftast vóru NSÍ álopini sambært somu uppskrift, sum tey so ógvuliga ofta hava verið í langa tíð. Sjúrður Jacobsen royndi at leggja diagonalbóltar úr vinstru. Esmar Eiðisgarð ansaði Helga L. Petersen, sum var ytstur í høgru í NSÍ álopinum. Tað kom EB/-Streyma maðurin sum oftast væl frá, og tað gjørdu Jóhann á Stongum eisini, tá ið hann loysti av síðstu løtuna. Men ta einu ferðina megnaði Helgi at leggja innfyri, og tað var nóg mikið til, at heimaliðið hevði øll stigini eftir við Løkin.

Í 2. hálvleiki var eina ferð um reppið, at NSÍ økti um munin. Gert Langgaard gjørdist leysur mitt fyri, men Gunnar á Steig bjargaði meistarliga væl.

Hetta var fjórða ferðin av fýra, at NSÍ vann øll stigini á heimavølli ímóti EB/-Streymi, og hetta var triðja ferðin seinastu trý árini, at EB/Streymur fór til hús uttan at hava skorað eitt tað einasta mál í Runavík.

### Sorin vandamikil

Hjá EB/Streymi mannaðu Knút Vesturtún og Gert Hansen miðverjuna, nú Fróði Clementsen og Pacek vóru burturfrá, og tað megnaðu teir báðir hampuliga væl. Leingi var fótbóltsspælið á sentrala miðvøllinum hjá EB/Streymi ikki nóg gott. Ov ofta var talan um langar sendingar, og tað hevði heimaverjan við Óla og Dánial Hansen í miðverjuni ikki stórvegis trupulleikar av.

Ætlanin og vónin hjá EB/Streymi var alla tíðina, at tað skuldi eydnast at raka Sorin Anghel, og kanska Sonna L. Petersen, sum við sínum skjótleika kundi verið hóttan ímóti gomlu liðfeløgunum. Í fyrra umfarinum eydnaðist tað mest sum onga tíð. Sum seinna umfarið leið legði EB/-Streymur meiri fyri í álopspartinum, samstundis sum teir sleptu eitt sindur í verjuni.

Fótbóltsspælið gjørdist eisini betri, eftir at teir høvdu gjørt onkra útskiftingina. Merkisvert var tað, tá ið Marni Djurhuus, sum undanfarnu árini hevur verið millum teir stinnastu, varð skiftur inn. Hann er ein fínur fótbóltsspælari. Hann megnaði at taka bóltin niður og spæla einfaltt víðari. Tað er ikki altíð, at tað skal so nógv til fyri at seta skikk upp á spælið saman við eisini innskifta Nicu Dogaru..

Tað er at undrast á, at Marni ikki hevur størri leiklut alla tíðina hjá EB/-Streymi, men tað hevur sína orsøk. Marni hevur mesta partin av hesum kappingarárinum verið plágaður av liðbandsskaða í fótliðnum. Hann hevur ikki fingið vant saman við hinum, og hóast hann hesa ferð var eyðsýndur ta løtuna, sum hann var á vøllinum, so sást tað væl, at hann framvegis ikki er heilt væl fyri.

Síðsta korterið var tað onkra ferðina um reppið, at Sorin Anghel gjørdist leysur. Hann megnaði at sneiða ein og tveir og kanska onkra ferðina fleiri mótstøðumenn enn so av sær. Men hetta nýtti hann nógva orku til, og so var ikki so nógv djús eftir, tá ið hann kom á brotsteigarmarkið og skuldi taka síðstu dragingina fyri at gerast heilt leysur ella kanska at verða feldur og harvið fáa brotssparkið.

Bestu EB/Streyma royndina í 2. hálvleiki hevði Knút Vesturtún. Uttarlaga úr brotsteiginum stútaði hann hart og væl eftir frísparksinnlegg úr høgru. Jens Martin toygdi seg upp í málhornið og endaði sjálvur í síðunetinum. Fyri hann og NSÍ kom tað væl við, at bólturin hesa ferðina fór út til hornaspark. Ikki stórvegis nærri enn tað tað kom EB/-Streymur. Størsti vandin í NSÍ brotsteiginum var, tá ið NSÍ eftir EB/Streyma frísparksinnlegg úr vinstru var um reppið at gera sjálvmál við handara stólpan. Men einki spurdist burturúr, og tað kom væl við hjá stevnuvertunum.

## FAKTA UM DYSTIN

**NSÍ-EB/Streymur 1-0 (1-0)**
1-0: Ian Højgaard 23.
**Dómari:** Oddmar Andreasen
**NSÍ:** Jens Martin Knudsen – Brynjolvur Nielsen, Dánial Hansen, Óli Hansen, Sjúrður Jacobsen (Áki L. Hansen, 85.) – Gert Langgaard (Kári Hansen, 67.), Jústinus R. Hansen, Ian Højgaard – Helgi L. Petersen, Andy Olsen (Súni Fríði Barbá, 67.), Jónstein Petersen
**EB/Streymur:** Gunnar á Steig – Carl H. Høgnesen, Gert Hansen, Knút Vesturtún, Esmar Eiðisgarð (Jóhann á Stongum, 81.) – Bárður Olsen (Nicu Dogaru, 62.), Jákup Martin Joensen, Hans Pauli Samuelsen, Hallur Jacobsen (Marni Djurhuus, 67) – Sonni L. Petersen, Sorin Anghel
**Gult kort:** Gert Hansen, Knút Vesturtún, Esmar Eiðisgarð

# Sigldu um kapp

Eins og sigur hevur verið nú í heilt nógv ár, so varð tað ikki bert kappróður, sum kappast varð í á Skálafjørðinum.

Kappsiglingin hevur eisini djúpar røtur á eystanstevnuni, og aftur í ár stóð hendan á skránni.

19 bátar høvdu boðað frá luttøku, og tá kappingin var av, vóru tað Odmar og Marner Joensen úr Kollafirði, sum høvdu staðið seg best.

Úrslitið av kappsiglingini framgongur annars av yvirlitinum niðanfyri, og eftir harða dystin, vóru luttakararnir bodnir umborð á Høganes, har steypahandanin og okkurt ábit var á skránni.

**-jm**

| Nr | Bátur | Manning | Bygd |
|---|---|---|---|
| 1 | Malle | Odmar og Marner Joensen | Kollafirði |
| 2 | Nón | Agnar Olsen og Kristian Hansen | Hósvík |
| 3 | Leivur | Bjarni og Jón Petersen | Kollafirði |
| 4 | Helga | Kaj og Hjørleif Johannesen | Kaldbak |
| 5 | Búgvin | Per Mikkelsen, Poul Arni Poulsen | Strendur |
| 6 | Gjáarbáturin | Janus Petersen, Johan Eysturoy | Vestmanna |
| 7 | Luddi | Jógvan Olsen, Óli Andrias Chrstiansen | Kollafirði |
| 8 | Niels í Nesinum | Alfred og Fríði Gullbein | Havn |
| 9 | Kollsteinur | Mikkjal Hansen | Hósvík |
| 10 | Vinur | Óli Mikkelsen | Havn |
| 11 | Lundin | Jónfríður Poulsen | Skála |
| 12 | Ternan | Kári Borgarklett | Hósvík |
| 13 | Sildin | Jónsvein og Páll Mikkelsen | Toftir |
| 14 | Elisabeth | Símun Olsen, Danjal Jacob Andre | Vestmann |
| 15 | Hella | Svend og Hallur Knudsen | Saltangará |
| 16 | Miðgerð | Johannes Johannesen | Kollafirði |
| 17 | Gurðið | Allan Poulsen | Saltangará |
| 18 | Sunnrid | Beinur og Høgni Joensen | Saltangará |
| 19 | Birgishamar | Esmar Petersen, Áki Hansen | Kollafirði |